UTTAN ÚR HEIMI

## IRA hjálpt palestinum

Ísraelsku myndugleikarnir hava illgruna um, at ein limur í forbodna írska republikanska herinum IRA hevur hjálpt víðgongdum palestinum at nýta spreingievni.

Írin varð tikin í síðstu viku og varð alt fyri eitt latin fregnartænmastuni Shin Beth til avhoyringar. Bretsk bløð skriva, at maðurin kom til Ísraels fyri einum mánað síðani, og at hann hevði bretskt pass. Úr Ísrael fór hann beinleiðis til tey palestinsku økini á Vestara Áarbakka, skriva bretsku bløðini. BBC vil vera við, at víðgongdir palestinar hava havt samband við hernaðarligar norðurírar seinastu 25 árini.

Ísraelsku myndugleikarnir hava hildið eitt serliga vakið eyga við útlendingum, síðani tveir bretskir muslimar sprongdu seg í luftina í Tel Aviv í apríl. Atsóknin var uttan fyri ein náttklubba og kostaði fimm mannalív.

## Heilsutiltøk fyri starvsfólkið

Alt fleiri danskar fyritøkur eru farnar at skipa fyri ymsum heilsufremjandi tiltøkum fyri starvsfólkið. Talan er um eitt nú kolesterolmátingar, klænkiskeið og skeið, sum skulu fáa fólk at leggja av at roykja.

Eitt av feløgunum, sum skipar fyri slíkum skeiðum á arbeiðsplássum, er Falck Healthcare, og tey hava munandi meiri at gera nú enn fyrr. Í fjør skipaðu tey fyri skeiðum á 80 arbeiðsplássum, men longu nú er talið í ár komið upp á 150. Í flestu førum er talan um arbeiðspláss, har færri enn 50 fólk arbeiða.

Stjórin í Falck Healthcare, Jan Steenhard, sigur við Jyllandspostin, at pengarnir, sum arbeiðsplássini nýta til heilsufremjandi tiltøkini, verða skjótt vunnir aftur. Eitt nú hevur tað víst seg, at sjúkradagarnir á arbeiðsplássunum fækka. Í Svøríki hava kanningar víst, at har fækkaðu sjúkradagarnir millum átta og tíggju prosent, eftir at fólk høvdu verið til tey heilsufremjandi tiltøkini.

## Pengarnar fyrst

Fyritøkur í Norðurnoregi, sum fáast við at hjálpa fremmandum bilum, sýta nú fyri at hjálpa russiskum lastbilum, fáa tey ikki samsýningina fyrst.

Í síðstu viku fór ein russiskur lastbilur útav við Alta. Bilurin varð vrak, og fleiri tons av laski, sum vóru í lastini, fóru fyri skeyti. Eitt norskt bjargingarfelag beindi vrakið burtur og royndi at bjarga sum mest av laksinum. Men nú situr bjargingarfelagið við rokningini, sum er 240.000 krónur, tí eingin er at gjalda hana.

Stjórin í bjargingarfelagnum sigur við Aftenposten, at tað er vónleyst at fáa at vita, hvør átti lastbilin, ella hvør hevði ábyrgdina av honum. Hann sigur, at eigaraviðurskiftini í Russlandi eru mangan so torskild, at tað loysir seg als ikki at royna at leita eftir tí veruliga eigaranum. Tí vil felagið nú hava pengarnar fyrst, áðrenn russiskir lastbilar fáa hjálp. Norska lastbilaeigarafelagið kærir seg um tað sama. Felagið hevur ofta hjálpt russiskum lastbilum, sum koyra í Noregi, men eisini har hevur tað víst seg at vera vónleyst at fáa nakra samsýning úr Russlandi.

## Førararnir vóru fullir

Løgreglan í suðursvenska býnum Trelleborg noyddist sunnudagin at koyra sjey lastbilar í land av einari ferju.

Manningin á ferjuni hevði kunnað løgregluna um, at lastbilaførararnir høvdu tikið ríkiligt til sín av tí váta slagnum á ferðini til Svøríkis, og tí stóð løgreglan fyri ferjuni, tá hon legði at í Trelleborg. Tá løgreglumenninir fóru umborð, vísti tað seg, at teir sjey niðurlendsku lastbilaførararnir vóru ikki koyriførir.

Tí noyddust løgreglumenninir at koyra lastbilarnar í land, og har vórðu teir standandi, sigur talsmaðurin hjá løgregluni í Trelleborg við Helsingborg Dagblad.

# Al-Qaeda hóttir við stórálopi

**Yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda sigur seg standa aftan fyri tey nógvu álopini á amerikanskar hermenn í Irak, og felagsskapurin hóttir við einum stórálopi**

IRAK
*Árni Joensen*

Hóttanin varð sett fram á einum ljóðbandi, sum arabiska sjónvarpsstøðin Al Arabiya sendi sunnukvøldið. Á bandinum varð eisini sagt, at tað eru ikki stuðlar hjá Saddam Hussein, sum hava skipað fyri álopunum á amerikansku hermenninar í Irak, men limir í al-Qaeda.

Í sjálvari hóttanini varð sagt, at teir heilagu krígsmenninir fara at skipa fyri einum stórálopi á um nakrar dagar, og at álopið fer at ryggbróta USA. Um álopið verður í Irak ella aðrastaðni, varð einki sagt um.

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, segði um vikuskiftið, at hann væntar, at álopini á amerikansku hermenninar í Irak fara at halda fram. Samstundis segði hann, at hermenninir í Irak verða ikki tiknir haðani enn, sum hann tók til. Fyri nøkrum døgum síðani segði verjumálaráðið Pentagon, at USA noyðist helst at hava einar 145.000 hermenn í Irak. Fyri bert fáum mánaðum síðani metti stjórnin í Washington, at tað fór at verða nóg mikið við 50.000 amerikanskum hermonnum í Irak.

Síðani tann 1. mai eru 32 amerikanskir hermenn deyðir í álopum í Irak. Tann seinasti doyði í gjár.

# Grimdarregn



*Tað er ikki bert í Kina og Bangla Desh, at tað hevur regnað illa í seinastuni. Hendan myndin er tikin í Moskva sunnudagin. Har stóðu fleiri vegir undir í vatni eftir áhaldandi regn*

*Mynd: Reuters*

# Blair lurtaði ikki eftir ávaring frá CIA

**Amerikanska fregnartænastan CIA ávaraði Tony Blair um, at høvuðsgrundgevingin hjá bretsku stjórnini fyri at leypa á Irak hevði ikki hald í veruleikanum, men Blair vildi ikki lurta**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*

Hósdagin hittast George W. Bush, forseti og Tony Blair, forsætisráðharri, í Washington, men hesaferð eru viðurskiftini ikki so hjartalig, sum tey hava verið.

Bretski uttanríkisráðharrin, Jack Straw, tvíheldur um, at Bretland mistók seg ikki, tá landið legði Irak undir at hava útvegað sær uran úr afrikanska landinum Niger. Ístaðin leggur hann nú USA undir at hava dult týðandi upplýsingar beint undan krígnum.

Amerikanska fregnartænastan hevur boðað frá, at hon ávaraði bretsku stjórnina um, at sumt av tí, sum stóð í einari stjórnarfrágreiðing um Irak í september í fjør, hevði ikki hald í veruleikanum. Tað váttar Jack Straw, men leggur afturat, at amerikanarar høvdu onga aðra frágreiðing.

- Vit høvdu tíðindini frá okkara álítandi keldum. Amerikanarar hava sjálvandi ikki somu keldur sum vit, so vit valdu at halda okkum til tað, sum vit vistu. Tá amerikanararnir seinni komu eftir, at upplýsingar okkara vóru grundaðar á følsk skjøl, søgdu teir okkum ikki frá, sigur Jack Straw.

Orðini hjá Straw eru úr einum brævi, sum hann hevur latið uttanríkisnevndini hjá parlamentinum, og eygleiðarar í London siga, at orðalagið er sjáldsama hvast, serliga tá hugsað verður um, at Blair skal hitta Bush hósdagin.




